

# Klaksvíkingur setti heimsmet við bingjuskipi

**Jógvan Hugo Gardar**

27.08.2014 - 10:05

Oljan.fo

21. juli fór Mary Maersk úr spanska havnabýnum Algeciras, og setti kós móti Tanjung Pelepas í Malaysia. Skipari erklaksvíkingurin Thorvald Hansen. Talan var ikki bara um ein vanligan túr til fjareystur.

Umborð vóru 17603 bingjur. Hetta er tað mesta nakað skip hevur verið lastað við í heimssøguni. Skipið kann hava 18270 bingjur av somu støðd, men enn hevur ein ikki roynt at hava so nógvar umborð.

Skiparin Thorvald Hansen sigur í samrøðu við Maersk Line Social, at tað er ein góð kensla at royna hetta, og at øll manningin hevur rós uppiborið fyri at hetta letur seg gera.

- Hetta er eisini eitt gott minni ein kann minnast aftur á seinni í lívinum, sigur hann.


MAERSK LINE